# Birds of Beauty í Føroyum

**Komandi dagarnar vitjar føroyavinurin Karsten Vogel í Føroyum við bólki sínum Birds of Beauty, ið sum kunnugt eisini hevur havt eina føroyska grein, Fagrir Fuglar, ið eisini góvu plátu út. Bird of Beauty vitja í Havn, á Tvøroyri og í Skálavík**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Karsten Vogel og hansara Birds of Beauty vitja í Føroyum í hesum døgum. Tann 3. juni spæla tey í Norðurlandahúsinum í samaband við, at Summarframsýningin letur upp. Leygarkvøldið 4. juni eru tey í Tvøroyrar Klubba klokkan 21 og sunnukvøldið 5. juni klokkan 19 eru tey í Skálavík.

### Føroyavinur

Karsten Vogel er gamal í garði innan tónleik og hevur eisini mangar ferðir vitjað í Føroyum. Bólkurin Birds of Beauty hevur eisini eina serstaka føroyska grein, nevniliga Fagrir Fuglar, sum eisini á sinni gav plátu út, nevnd Veðurløg.

Søgan um Vogel, føddur í 1943, er long, tí hann hevur verið og er sera virkin maður.

Heilt stutt kann sigast, at Vogel grundlegði stórar og ódeyðiligar bólkar sum Burnin Red Ivanhoe og Secret Oyster og arbeiddi eisini nógv saman við Frits Helmut. Hansara fjølbroytta virksemi hevur ført hann kring heimin og til Føroya fyrstuferð í 1971 við Burnin Red Ivanhoe. Hann hevur arbeitt innan mong tónleikasløg og innan mong vikisøki. Vogel hevur fingið heiðursgávur og eisini lívslanga listalegatið. Hann hevur innspælt fleiri enn 50 útgávur.

### Fuglarnir

Á ferðini í Føroyum spælir Karsten Vogel saman við Heidi Petersen, fødd 1971, og føroyska guitarleikaranum Heðin Z. Davidsen.

Heidi er kend sum trummuleikari í Big Bandinum Wonderbra og sum trummuleikari til fleiri danskar sangleikir. Hon hevur leikt við rockbólkum sum Uncle Frank's Rash og Kinguru. Hon hevur fingið undirvísing á AM linjuni á Kgl. Konservatoriinum og hevur eisini nomið sær kunnleika í Los Angeles, har m.a. Ralph Humphfrey og Joe Pocarro undirvístu.

Heðin Z. Davidsen verður mettur sum ein av dugnaligastu yngru tónleikarunum í Føroyum og hevur spælt innan mong tónlistaøki.

Fuglafjarðar skúli:

# 6. flokkur plantar summarblómur

Børnini í 6. flokki í Fuglafjarðar skúla høvdu náttúrutøkni fríggjadagin 13. mai tá tey saman við lærarara, gartnara og hjálparfólki vóru í Miðstaðarlundini og plantaðu summarblómur. Tey skuldu læra eitt sindur um planting, og var tað eitt gott høvi at hava tey við. Veðrið var av tí allar fagrasta, og hýrurin sum vera man góður.

Eftir at hava tosað eitt sindur um planting av summarblómum, var farið í gongd. Dreingirnir fóru í gongd beinanvegin og vóru skjótt lidnir, meðan genturnar høvdu nógvar spurningar og fingu eitt gott prát um summarblómur og planting. Eftir tveimum tímum vóru tey liðug og Miðstaðarlundin var nú prýdd við summarblómum, sum øll kunnu njóta sýnið av langt út á heystið.



*Genturnar í 6. flokki í Fuglafjarðar skúla*



*Dreingirnir í 6. flokki í Fuglafjarðar skúla saman við Jonsvein Poulsen, lærara, og Eyðun Larsen frá Fuglafjarðar kommunu*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

**Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin**

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**